# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Klárt til hálvfinalur

**Mánakvøldið var seinasta liðið funnið, ið skal spæla hálvfinalu í African Nations Cup. Mest vinnandi tjóðin í hesi kapping, er Egyptaland, og nú eru teir aftur í hálvfinaluni**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*



*Mohammed Zidan, sum eitt skifti spældi við FC Midtjylland, hevur gjørt nógv um seg í African Nations Cup. Sjálvasti José Mourinho hevur róst honum til skýggja, og sum tað sæst á myndini, so eru áskoðararnir eisini ovur fegnir um bóltsnillingin*

*Mynd: Polfoto/AP*

Egyptaland hava enn einaferð megnað at spælt seg í hálvfinaluna, og hetta hendi, tá teir í gjárkvøldið vunnu 2-1 móti Angola í seinastu fjórðingsfinaluni.

Egyptaland hevur vunnið kappingina heili fimm ferðir, og er tað mest av øllum, síðan kappinin byrjaði, afturi í 1957, tá júst Egyptaland vóru vertir.

Egyptaland við bóltsnillinginum Mohammed Zidan, ið eitt skifti var at finna í donskum fótbólti, á bonkinum, komu betur frá byrjan, og tá ein verjuleikari hjá Angola nýtti hondina í egnum brotsteigi, varð bríkslað fyri brotssparki, og Hosny kundi so lættliga skora við brotssparkinum, og leggja meistararnar frá í fjør, á odda.

Tað gingu tó bert tríggir minuttir, áðrenn Manucho javnaði fyri Angola, við einum framúrskarandi vinstrabeinsskoti frá brotsteigarmarkinum, ið rakti undir tvørstongina og í málið.

Men seks minuttir undan steðginum skoraðu Egyptaland aftur, og hesaferð skuldi talan gerast um avgerandi málið. Innlegg kom frá Ahmed Fathi, og tá bólturin slapp at ferðast millum vinir og fíggindar í brotsteiginum, kundi Amr Zaki beina bóltin í málið við økslini, tá hesin kom at standa leysur við handara stólpan.

### Stórsigur til Chelsea-stjørnur

Hini liðini í hálvfinaluni eru Cameroun, Fílabeinsstrondin og Ghana.

Cameroun vann í gjárkvøldið sína fjórðingsfinalu móti Tunis, men tað tók fast, áðrenn sigurin var heima. Eftir 90 minuttum stóð á jøvnum, men eftir fimm minuttum av longdu leiktíðini kundi Stephané Mbia senda avgerandi bóltin í kassan.

Sunnudagin vunnu vertirnir úr Ghana á Nigeria við 2-1, og Fílabeinsstrondin, sum verður mett sum ein av favorittunum í kappingini, vann heili 5-0 á Guinea. Chelsea-spælararnir, Didier Drogba og Salomon Kalou stóðu fyri trimum av málunum hjá Fílabeinsstrondini.

# Víkingar í Sarpugerði

**Á eykaaðalfundi í gjárkvøldið varð avgerð tikin um, at samanlagda GÍ/LÍF skal eita Víkingur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um uppskot frá Rúna Bjarkhamar, sum einmælt varð samtykt sum nýggja navnið hjá felagnum. Víkingur, sum nýggja felagið altso eitur, fer at spæla sínar heimadystir í Sarpugerði, ið er tann vøllurin, sum kommunurnar vilja syrgja fyri lýkur neyðugu FSF-krøvini.

GÍ og LÍF gjørdu herfyri av at leggja saman í nýtt felag. Og millum fyrstu málini á skránni hava verið nýtt navn og nýggjur spælibúni til felagið.

Nú er navnið so funnið, men enn hevur nevndin ikki gjørt av, hvussu spælibúnin fer at síggja út. Á stovnandi aðalfundinum tóktist semja tó vera um, at litirnir skuldu hvørki verða gulir ella grønir, tí tað er umráðandi, at felagið fær ein nýggjan samleika, sum ikki er tengdur meira ella minni at GÍ ella LÍF.

# Morten Olsen til Føroya

**Danski landsliðsvenjarin í fótbólti skal í mars mánaði undirvísa venjarum, sum taka A-venjaraútbúgvingina hjá FSF**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá FSF stendur at lesa, at nýggja A-venjaraskeiðið byrjaði um vikuskiftið. Hetta er aðru ferð, at FSF hevur slíkt skeið.

Tað verður eisini avdúkað á heimasíðuni, at danski landsliðsvenjarin í fótbólti, Morten Olsen, verður ein av undirvísarunum á skeiðnum. Hann skal undirvísa onkran av døgunum millum 10. og 16. mars, og evnið hjá Morten Olsen verður spælistílur.

Útbúgvingin fer annars fram í seks pørtum. Fimm ferðirnar eru venjararnir samlaðir, og har av er talan í einum føri um námsferð.

Seinasti parturin av skeiðnum er sjálv próvtøkan, og verður hendan í døgunum 2. til 9. juni í komandi ári.



*Spælistílur verður á skránni, tá danski landsliðsvenjarin kemur á Føroyavitjan í mars mánaði*

# IL Hødd hugsar føroyskt

Hóast Rógvi Jacobsen enn ikki hevur verið í týðandi dyst fyri nýggaj felag sítt, so tykjast hesir longu nú hava fingið størri áhuga fyri føroyskum spælarum. Lokalu miðlarnir í Noreg vita at siga, at Hødd nú hevur í umbúna at hyggja nærri at Kristoffur Jacobsen, sum er systkinabarn hjá Rógva.

Kristoffur eigur enn fyrsta A-landsdystin tilgóðar, men fyri KÍ og U21-landsliðið hevði hann fleiri sannførandi avrik í fjør.

**-mørk**